VALGREINAR

tralala..... Í Norðstreymoy ein sólskinsdag.....

Sigvald Zachariasen
valevni fyri Sjálvstýrisflokkin

- og norðstreymoyingur við stórum N.

Sitið og hugsi um tíðina, mær er givin, at vaksa upp og búleikast í Sundalagnum, ein sonn náttúruperla vit føroyingar eiga. Einamest um gingið verður ein túr niðan á fjøllini, kemur hesin vakurleiki beint inn í hjartarøturnar. Sálarbót av aðrari verð. Eg var við til, at leggja tann nýggja samskiftiskaðalin úr Tjørnuvík til Mýrarnar omanfyri Vestmanna. Haðani frá og víðari til Kollafjarðar, fyri síðan at enda í Havn. Hesir túrar góvu nakað íð er so gott, at tað má upplivast, tí ikki er lætt at seta orð á. Havi eisini veri úti á Dølum, so langt vesturi, at einans sjógvur foraði einum, at gangað longur. So eg havi í øllum førum forstáilsi fyri teimum monnum, ið røkja Dalar v.m., sjálvt um onkur er ið sigur seg ikki skilja hesar menn. Tað sama er galdandi fyri teir, ið røkja Kvívíkshagarnar, við Leynavatn, í Kollafirði, í Hósvík, í Hvalvík og Streymnesi, í Saksun, á Langasandi, í Haldarsvík, og ikki minst norðuri í Tjørnuvík.

Góðu norðstreymoyingar, latum okkum ikki geva okkara kosnu monnum á Føroya Løgtingi, meir enn tað einu ferðina, loyvi til at klíva Norðurstreym í tvey ymisk øki, nevniliga eystur og vestur.

Hetta gjørdi Hans Pauli Strøm alment í bløðunum, samstundis sum hann kallaði sítt bygdafólk fyri hulduvestmenningar, eisini alment í bløðunum. Jógvan Durhuus tykjist mær bert koma hartil, at hann hugsar "skal eg siga naka"? Nei, lat meg bara sita her í frið, eg bíði til vali, tí eftir tað fái eg helst aftur frið. Fólkafloksumboði í Kollafirði kom á ting, men svíkti, fólkaflokkinum so líkt

Norðstreymoyingar eiga og mugu standa saman lið um lið, og verða stoltir. Øki er stórt geografiskt, og upplandi er sera gott, bæði til sjógvin og landi. Standa vit saman, kunnu vit menna tað til alt slag av vinnuvirksemi, sum er treytin fyri, at vit styrkjast og trívast, bæði til ítrótt, gæman og álvara. Treytin er tó, at vit samlast á miðjuni.

Vilja tit, at okkara øki skal mennast "saman" við okkara fólkavaldu umboðum? Eg vil!

V.V.V. Viljin Vísir Vegin.

Velji Sjálvstýrisflokkin, ein samfelagsvinarligan flokk, sum hevur ein knúsandi sterkan og sunnan vilja. Flokkurin er eisini gamal í garði, so hann veit vegin. Allir flokkar vilja nú á henda sama veg, og tað beint eftir miðjuni. Men góði veljari, takka fyri, og styrk um Sjálvstýrisflokkin fyri hansara vilja, ið vísti á henda samfelagsveg eftir 96 ára langt stríð. Sjálvstýrisflokkurin kemur innaftur á ting, tað eri eg steinsikkur uppá. Hugaligt hevði veri, um vit í Norðstreymoyar valdømi gólvu flokkinum eina virðiliga 100 ára føðingardagsgávu. Men hetta gerst bert við at standa saman, og seta umboð fyri flokkin á Føroya Løgting valdagin tann 30-04-2002, fyri okkara valdømi.

Suðuroyingar avgera valið og egnu framtíð

Finnleif Guttesen,
sambandsvalevni í Suðuroy

Fýra samríkislimir?

Tað er hugaligt at síggja, at suðuroyingar ætla at verja garð um ríkisfelagsskapin.

Veljarakanning vísir, at vit fáa tríggjar samríkislimir, tveir til Javnaðarflokkin og ein til Sambandsflokkin.

Men kanningin vísur eisini, at tann fjóri tinglimur er nakað ótryggur.

Tjóðveldisflokkurin stendur til at fáa tann fjóra, men um Suðuroyingar stuðla Sambandsflokkinum, so eiga samríkisflokkarnir allar fýra løgtingslimirnar her suðuri.

Við fýra samríkis løgtingsmonnum verður munandi lættari, at velja eina mennandi kós fyri Suðuroy. Vit sleppa undan møðandi kjakinum um loysing, og kunnu ístaðin brúka arbeiðsorkuna til at verja okkara áhugamál her suðuri.

Lat okkum standa saman og lyfta í felag so at Suðuroyggin aftur kann mennast, og ikki framhaldandi vera tann gloymda oyggin.

Føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti

Tórbjørn Jacobsen
fólkatingsmaður

Tórbjørn Jacobsen setir uppskot fram á fólkatingi um, at stjórnin skal boða ST frá, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti

Í svari til Tórbjørn Jacobsen mikudagin boðaði danski forsætisráðharrin frá, at hann ikki kann viðurkenna, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

Tórbjørn Jacobsen góðtekur ikki hetta, og er tí farin víðari við málinum. Hann hevur nú sett fram hetta uppskot á fólkatingi:

Folketinget opfordrer regeringen til at erklære overfor de Forenede Nationer (FN), at Færøernes folk har ubegrænset selvbestemmelsesret i henhold til folkeretten.

Tórbjørn Jacobsen tekur í viðmerkingunum til uppskotið fram hesi viðurskifti:

- Tað er eingin ivi um, at føroyingar lúka allar treytir til tess at verða roknaðir sum ein tjóð sambært fólkarættinum.
- Føroyingar hava ongantíð á demokratiskan hátt viðtikið donsku grundlógina sum sína egnu grundlóg.
- Tí kann danski staturin ikki av røttum mótvegis altjóða samfelagnum halda uppá, at Føroyar eru ein samrunnin partur av danska statinum. Og tí hevur Føroya fólk krav uppá at verða viðurkent sum eitt sjálvstøðugt fólkarættarligt subjekt - t.e. ein sjálvstøðug eind í altjóða rætti.
- Hetta ger eisini, at Føroya fólk hevur krav uppá at fáa viðurkent sín ómissandi sjálvsavgerðarrætt sambært fólkarættinum. T.e. at tað er Føroya fólk - ikki danska statsvaldið - sum er hægsti myndugleiki í spurninginum um framtíðar rættarstøðu Føroya.
- Men danska statsvaldið hevur aftrað seg við at viðurkenna hendan ófrávikiliga veruleika mótvegis altjóða samfelagnum. Í mongum fráboðanum til ST verða Føroya bert umrøddar sum eitt danskt "fólkasamfelag". Hetta gevur ikki Føroyum nøkur rættindi yvirhøvur. Hugtakið "fólkasamfelag" er ikki til í altjóða rætti.
- Seinast hendan vantandi viðurkenning fekk beinleiðis og negativar avleiðingar, var undir fullveldissamráðingunum í 2000. Poul Nyrup Rasmussen noktaði tá at viðurkenna at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og helt við støði í hesum uppá, at samráðingarnar vóru eitt reint danskt innanríkspolitiskt mál.
- Harvið var tað ein stjórn, ið samráddist við ein undirskipaðan myndugleika. Tí var eingin javnstøða millum partarnar, ið sum kunnugt høvdu heilt hvør sítt endamál. Og harvið hevði Føroya Landsstýrið heldur ongan møguleika fyri at fáa skapt javnstøðu millum partarnar.
- Tá landsstýrið, eftir at nógvar avtalur vóru brotnar, vendi sær til ST og spurdi um framferðarháttin, tá ST er eygleiðari undir slíkum samráðingum, boðaði danska stjórnin ST frá, at Føroyar bert eru eitt "fólkasamfelag" sum ikki hevur nakran rætt til at virka á fólkarættarligum støði.
- Tá forsætisráðharri Íslands beyð sær at vera eygleiðari, bleiv eisini tað blankt avvíst.
- Og tá landssyrið royndi at koma í samband við NATO til tess at fáa greiði á nøkrum fyri Føroyar týdningarmiklum málum, forðaði danska stjórnin eisini hesum. Í staðin fekk landsstýrið upplýsingar um trygdarviðurskifti frá stjórnini, sum vóru beinleiðis skeivar.
- Alt hetta vóru brot á tey rættindi, sum Føroya fólk hevur. Tí Føroya fólk hevur, sum tjóð sambært fólkarættinum, ávís rættindi á altjóða pallinum. M.a. rætt at seta spurningar til felagsskapir sum ST og NATO.
- Úrslitið av framferðini hjá Nyrup-stjórnini var, at tað var ógjørligt at samráðast.
- Tann nýggi forsætisráðharrin er tíverri komin við útsøgnum, sum benda á, at heldur ikki hann viðurkennir tjóðarrættindi Føroya. Og tá hann 17. apríl beinleiðis varð spurdur um hann vildi viðurkenna tann veruleika, at Føroya fólk er eitt fólkarættarligt subjekt við sjálvsavgerðarrætti, var svarið noktandi.
- Tað er ógvuliga óheppið, at hetta er stoðan hjá danska statinum í 2002. Tí hetta er eitt greitt brot á rættindi Føroya fólks, og er eisini í stríð við tær demokratisku grundreglur, sum eru galdandi um okkara leiðir.
- Danskir forsætisráðharrar kunnu ikki aftur vísa hesum atfinningum við aftur og aftur at siga, at eitt føroyskt ynski fer at verða virt av fólkatinginum. Hetta snýr seg jú í fyrsta umfarð um at fáa eina javnbjóðis samráðingarstøðu. Tað fingu føroyingar ikki í 2000. Í øðrum umfari snýr tað seg um, at Føroyar fólk er evsti myndugleiki í hesum máli. Ein sjálvsavgerðarrættur, sum byggir á vælvild frá danska fólkatinginum, er ikki sjálvsavgerðarrættur sambært fólkarættinum.
- Tað er eisini vert at minna á, at 35 lond í Europa og Norðurameríka í 1975 viðtóku Helsingforsskjalið. Í øðrum parti av 8. grundreglu í hesi viðtøku stendur soleiðis:

"Við heimild í grundregluni um javnrættindi tjóðanna og sjálvsavgerðarrætti teirra hava allar tjóðir altíð rætt til, í fullum frælsi, tá ið tær vilja og sum tær ynskja tað, at taka avgerð um sína innaru og ytru politisku støðu, uttan uppílegging uttaneftir, og eftir egnum ynski at fremja politisku-, búskapar-, samfelags- og mentanarmenning sína".

Tá talað verður um rættin til at taka avgerð um sína "ytru politisku støðu", verður sjálvsagt meint við rættin at stovna egnan stat. Tað er tað sama sum tann fólkarættarliga ásetingin um "external self-determination" - t.e. at ein tjóð, sum evsti myndugleiki, hevur rætt at taka hesa avgerðina.

Uppskotssetarin sær onga sakliga grundgeving fyri, at tann føroyska tjóðin skal falla uttanfyri, tá Helsingforsskjalið talar um "allar tjóðir".

Tá mælir hann fólkatinginum til at viðtaka uppskotið.

--

Hjálagt hesum skrivi er sjálvt uppskotið, sum lagt er fyri fólkatingið.

Tað er framvegis ikki greitt, nær hetta uppskot kemur til viðgerðar.

VALGREINAR

Javnaðarflokkurin er lykilin

Dan R. Petersen
løgtingsmaður

Lesa vit samgonguskjalið hjá fráfarandi samgongu, so vóru lyftini bjørt og vónirnar stórar.

Nøkur hissini brot: Nýggj grundlóg skuldi evnast og leggjast til fólkaatkvøðu. Loysingin skuldi út til fólkaatkvøðu. Øll málsøkir undir føroyska lóggávu og umsiting. Avgjøld á húsarhald lækka . Meirvirðisgjaldið endurskoðast. Umsitingin rationaliserast og gerast bíligari. Lóg um endurnýggjan av fiskiflotanum setast í gildi. Landbúnaðurin styrkjast. Trupuleikarnir á røktarheimsøkinum loysast. Nýggja pensiónslóg. Greiðan íbúðarpolitikk o.s.f.- o.s.f. Men onki av hesum hendi. Upp á langlegg og niður á tjólegg.

Eitt eljustríð við danir øll 4 árini hevur hult teir verunligu trupuleikarnar í mjørka.

Hesar trupuleikar, hesi óloystu mál, samgongan lovaði, hevur eggja javnaðarflokkin til eina nýggja valskrá, sum setur navn á trupuleikarnar.

Røktarheimspláss, døgnrøktarskipan, munandi hægri pensiónir. 1-ára barnsburðarskipan og ansingartrygd. Vard størv fyri brekað. Búpláss til brekað. Kollegiu bygging og mentanartilboð. Verkafólkið skal hava greið setanarviðurskiftir. Rætt til eftirútbúgving, og gott arbeiðsumhvørvi.

Og vit skulu ikki klandrast við danir. Í frið og náðum fara vit við samgonguflokkum til tingingar við danir og gera semju um eina sjálvstýrislóg, har vit fáa fult lóggávuvald á øllum málsøkjum, sum vit yvirtaka tá politiskur vilji og búskaparligar umstøður eru til tess. Gera ein sáttmála, sum liggur innan fyri ríkiselagsskapin.

Bert miðjan í føroyskum sjálvstýrispolitikki kann savna nóg stóra undirtøku fyri eini loysn á ríkisrættarliga málinum og her situr janvnaðarflokkurin við lyklinum.

Ein stórur tjóðveldisflokkur ger ein stóran sambandsflokk. Ja teir liva av hvørjum øðrum, og tann óvirðiliga støðan heldur fram.

Vallyfti okkara eru góð, og sum fyrsti flokkur hava vit gjørt útrokningar soeiðis, at tað sæst, hvat okkara politikkur kemur at kosta komandi 4 árini. Javnaðarflokkurin setur fólkið fyrst. - So er tað enn einaferð sagt.

Búskaparvøksturin

Jógvan Páll Poulsen
valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Teir, sum mynda sitandi samgongu, fóra fram, hvussu væl teir hava stýrt. Sum prógv fyri tí, vísa teir á, at teir hava fingið búskapin á fótur aftur. Tað verður sagt, hvussu nógv teir hava sett í landsbankan.

Tað sær út, sum teir vilja hava fólk at trúgva, at tað er sitandi samgonga, sum hevur æruna av, at rokút, sum teir halda, tað eru teir, sum hava fingið prísin á fiskavørum í topp á heimsmarknaðinum.

Sitandi samgonga sær eisini út til at rokna við, at henda gongdin, sum hevur verið hesu seinastu árini, skal halda fram óbroytt langt fram í tíðina.

Vit mugu bara staðfesta, at enn hava vit bara tað, sum kemur upp úr sjónum at dúga uppá. Vit hava ikki rætt hond frá síðu til at fáa nakra aðra vinnu upp at standa, heldur ikki hesi seinastu góðu árini.

Nei, vit eru ikki inni í einari tryggari fullveldisgongd, sum onkur førir fram, alt annað.

Heldur tú, at hesi fólk skulu sleppa at halda fram eftir valið?

Gott val

fiskiskapur hevur verið á nærum øllum økjum (burtursæð hjá rækjuflotanum). Tað sær eisini

Hugsjónin

Gunnar K. Nattestad
valevni Sambandsfloksins í Vágum

Ríkisfelagskapurin við Grønland og Danmark er eitt av beinunum hjá Sambandsflokkinum. Sambandið millum hesar tjóðirnar er til eina og hvørja tíð, eru hvørjar vilja og viljanum til samstarv. Um viljin er til staðar, er ríkisfelagsskapurin ein góður grundvøllur fyri framhaldandi trivnaði og menning av okkara land.

Innanfyri felagskapin hevur eingin tjóð fullveldið, men allar tjóðirnar hava størri rásarúm og fleiri møguleikar enn um tær vóru einsamallar. Hettar er kjarnin í sambandshugsjónini.

Ríkisfelagskapurin er ikki átrúnaður. Tíðirnar broytast og eingin veit hvat hendir um 100 ár. Men sum stoðan er nú, er lítil yvi um at tær smáu tjóðirnar standa seg best í felagskapi.

Tað er ikki altíð ein dansur á rósum at samstarva, heldur ikki við Danmark. Men hyggja vit at hvussu nógv okkara samfelag er ment seinastu gott hundrað árini, so er skilligt, at fyrimunirnir hava verið nógv størri enn vansarnir. Vit eru komin frá bóndasamfelagnum til eitt vælferðarsamfelag ið er millum heimsins fremstu. Flestu onnur lond hava brúkt tvey til tríhundrað ár um somu menning.

Samstarv krevur dirvi, ikki minst frá okkara síðu. Vit eru tann minsti parturin í felagskapinum, bæði í talið og vídd, men vit hava nógv at bjóða. Hettar hevur verið, er og skal prógvast í verki framyvir.

Sum er fáa vit eina peningaliga veiting frá Danmark og hettar hevur verið okkum til stórt gagn. Nú er tó tíðin komin, at vit mugu byrja at seta kósina móti einum sjálvberandi búskap. Liberala hugsjónini gevur tí einstaka frælsi og ábyrgd. Hettar merkir m.a. at einstaklingurin so vítt gjørligt, skal klára seg sjálvan búskaparliga. Ríkisfelagskapurin er ikki ein búskaparligur koddi at sova á og tí skula vit í longdini gjalda okkara egna húsarhald; men tað merkir ikki at vit kvetta felagskapin. Tvørtur í móti!

Vit eiga at uppbyggja og laga okkara felagskap til tey krøv og broytingar ið koma. Hettar, saman við liberalu og sosialu hugsjónini, er eitt sera gott grundarlag fyri nútíð eins væl og framtíð. Sambandsflokkurni ferð ikki at leggja árarnar inn bara tí tað eru nøkur rista í brókunum av at verða í felagskapi við onnur lond.

Tað skal verða gott at eldast í Føroyum!

Eliesar Poulsen
valevni Javnaðarfloksins, Hvalba

Tey seinastu tretivu til fjøriti árini er tað føroyska samfelagið broytt á flest øllum økjum. Tað vanliga samfelagsmynstrið, har maðurin arbeiddi úti, og konan var í heiminum og ansaði børnum og teimum gomlu, er skjótt ein farin tíð.

Nútíðarsamfelagið er fulkomuliga broytt, tá tað snýr seg um arbeiðsbýti millum menn og kvinnur. Flest allar kvinnur arbeiða uttan fyri heimið, um møguleikar eru fyri hesum, bæði tí tær hava hug til tað, og í nógvum førum eisini, tí tað er vorið so kostnaðarkrevjandi at útvega tað dagliga breyði og tak yvir høvdið. Tað er neyðugt er við tveimum inntøkum um endarnir skulu røkka saman. Hetta setur heilt onnur og nýggj krøv til okkara samfelag.

Nú mugu børnini og tey gomlu ansast uttan fyri heimið. Fyri at nøkta hendan tørv, er alneyðugt at útvega barnaansingar- og røktarheimspláss, men ikki kann sigast, at hetta hevur verið sett í fremstu rað. Tørvurin hevur ongantíð verið størri enn nú, og hann sýnist bert at økjast.

Í farna valskeiði er alt ov lítið gjørt fyri at nøkta tørvin á ansing fyri okkara gomlu. Um vit skulu bera heiti í okkara skjaldramerki, at tað skal verða gott at eldast í Føroyum, mugu vit taka annað skinn um bak, tí stoðan er vanlukkulig.

Fyrsta treyt fyri at bøta um hesa stoðu er at økja um heimarøktina við eini dagrøktarskipan, so okkara eldru og gomlu fáa alla tað hjálp, ið tørvur er á, fyri at tey kunnu vera sum longst heima hjá sær sjálvum, tí sjúkan ella tørvurin á hjálp endar ikki kl. 18.00 - 20.00 - 22.00. Tað er neyðugt, at ein skipan við náttarvakt kann setast á stovn, so tey gomlu altíð kunnu kenna seg trygg bæði á nátt og degi.

Næsti møguleikin fyri at bøta um stoðuna hjá hesum okkara gomlu medborgarum er at útvega hølir til eldrasambýli, har gomul, ið ikki er før fyri at búgva heima, kunnu búgva. Hetta setur sjálvsagt krøv til eina vaktarskipan bæði á degi og nátt. Nógvir møguleikar eru fyri hvussu hølir kunnu útvegast til hetta endamál. Bæði verandi- ella nýggjar bygningar kunnu nýtast, tí sjálvsagt eru tørvur og møguleikar ymiskir frá øki til øki í landinum.

Nevndu møguleikar kunnu nøkta tørvin í ein stóran mun, um nóg nógv orka verður nýtt til endamáli, men ein og hvør má gera sær greitt, at hesar loysnir nøkta ikki allan tørvin, tí vit hava nógv gomlul, ið ikki kunnu verða heima hjá sær sjálvum ella á sambýli. Tey krevja røkt mest sum alt døgnið. Hesum gomlu fólkum er sjálvsagt neyðugt at útvega røktarheimspláss. Mett verður, at tann akutti tørvurin á røktarheimsplássum er millum trý- til fýrahundrað í øllum landinum.

Um komandi samgonga ikki tekur viðurskiftini á eldraøkinum í stórsta álvara og bøtir um stoðuna, er tað ein stórur spurningur, um vit kunnu kalla okkum fyri eina framkomna og mentaða tjóð.

Í Føroyum skulu fólk hava eini virðilig og mannsømulig ellisár.

Vit skulu tryggja okkara gomlu, at fólkapensiónin og samhaldsfasti eftirlønargrunnurin skulu vera á einum slíkum stoði, at tey gomlu skulu hava ráð at liva.

Einasta veruliga trygd veljarin og tey gomlu hava fyri at landsins myndugleikar gera álvara av at bøta um korini hjá teimum gomlu, er at sta ein sterkan javnaðarflokk á ting týsdagin 30 apríl. Javnaðarflokkurin er einasti veruligi sosiali flokkkur, ið kann tryggja borgaranum góð og mannsømilig kor. Og hetta er galdandi fyri bæði gomul og ung.

Set tí tín kross fyri Javnaðarflokkinum ella einum av valevnum hansara.